Álit

í

løgtingsmáli nr. 36/2023: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um áseting av skatti (Ásetingarlógin) (Skattaumskipan 2024 og 2025, javning av skattastiganum)

Landsstýriskvinnan í fíggjarmálum, Ruth Vang, hevur lagt málið fram 3. november 2023, og eftir 1. viðgerð 7. november 2023 er tað beint Fíggjarnevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi 9., 13., 16. og 30. november og 6. desember 2023.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við Samtak, Føroya Fiskimannafelag og Maskinmeistarafelagið, Áhugafelagið Antares, Landsfelag pensjónista, Reiðarafelagið, Skipara- og navigatørfelagið, Vinnuhúsið, Búskaparráðið, Landsbankan og landsstýriskvinnuna í fíggjarmálum, Ruth Vang, saman við ávikavist Hagstovuni og TAKS.

Undir viðgerðini hevur nevndin býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Eyðgunn Samuelsen, Bjarni Hammer, Eirikur í Jákupsstovu og Hanna Jensen) staðfestir, at tað í samgonguskjalinum er ásett, at ein skattalætti skal verða veittur lág- og miðalløntum. Hetta verður framt í einari skattaumlegging, har til dømis ein vanlig fulltíðar arbeiðaraløn í 2025, ið tá verður mett til at verða millum 320.000 og 340.000 krónur árliga, fær ein skattalætta millum 545 og 630 krónur um mánaðin, meðan til dømis sjúkrarøktarfrøðingar og handverkarar í 2025 fáa ein skattalætta á umleið 1.000 krónur um mánaðin.

Í hesari skattaumleggingini verður ovasta skattastigið lækkað niður til 600.000, so hægstu lønirnar fáa ein minni skattalætta enn hinir bólkarnir av arbeiðandi fólki í Føroyum.

Eitt dømi kundi verið ein ársinntøka uppá 800.000 krónur, har skattalættin í 2025 verður umleið 250 krónur um mánaðin, samanborið við arbeiðarainntøkuna, ið fær ein skattalætta á millum 545 og 630 krónur um mánaðin.

Tað er greitt, at lægstu inntøkurnar, og serliga tey, sum ikki arbeiða fulla tíð, ikki fáa líka stóran lut í skattalættanum, sum til dømis miðalinntøkurnar. Hesir láginntøkubólkar rinda tó frammanundan avmarkaðan landsskatt.

Skipanin er tó sett saman soleiðis, at tað hjá alsamt fleiri fer at liggja meira eftir, um tey til dømis fara at arbeiða fulla tíð. Til dømis fer tað hjá einum heilsuhjálpara at verða soleiðis, at skatturin á síðst vunnu krónuna lækkar 5 prosentstig, ið hevur við sær, at heilsuhjálparin, sum tekur eina eyka vakt, fer 10% upp í løn av tí eyka vaktini.

Fígging
Fyri at liva upp til, at skattalættin er fult fíggjaður, er talan vorðin um eina skattaumlegging, har hvørt fíggingarátak verður gjøgnumført í serstøkum løgtingsmáli.

Yvirskipað kunnu hesi átøkini býtast í trý: Hækkað gjøld á dálkandi orkukeldur til vinnu og húsarhald, størri gjøld fyri atgongd til tilfeingi og niðurlaðing/avtøka av serskattaskipanum.

Viðvíkjandi hækkaðu avgjøldunum ber yvirskipað til at siga, at skattatrýstið er alsamt hækkað seinastu árini. Bara síðan 2016 eru skattainntøkurnar hjá landinum vaksnar við upp ímóti 700 mió. kr. úr 1,3 mia. kr. til umleið 2 mia. kr. Í sama tíðarskeiði hava avgjøldini staðið í stað á umleið 250 mió. kr.

Sostatt er ein alsamt størri partur av almennu útreiðslunum fíggjaður gjøgnum inntøkuskatt, meðan avgjøldini áhaldandi gerast ein lutfalsliga minni partur. Við hesari umskipanini verður farið eitt vet burtur frá fígging við inntøkuskatti til fígging gjøgnum avgjøld.

Meirilutin heldur tað vera rætt, at arbeitt verður víðari við einum leisti at javna skattaskipanina, so inntøkuskatturin ikki áhaldandi veksur, so hvørt sum lønirnar vaksa í okkara samfelag.

Viðvíkjandi tilfeingisinntøkum er ásett í samgonguskjalinum, at ein munandi, men rímiligur partur av tí serstaka vinninginum – tilfeingisrentuni – sum vinnulig serrættindi kunnu hava við sær, falla til landið. Við støði í hesum eru tilfeingisgjøldini hjá ali- og fiskivinnuni dagførd, so ein nakað størri partur av tilfeingisrentuni fellur til landið.

Viðvíkjandi serskattaskipanum verður í hesum umfari hugt at fiskimannafrádráttinum, sum tvey tey næstu árini verður lækkaður við einum skattligum virði á kr. 11.900, umframt uttanlandsfrádráttinum og samdøgursfrádráttinum, sum sambært uppskotinum stigvíst verða avtiknir komandi 5 árini.

Undir hoyringunum hevur verið víst á, at tað kunnu verða spurningar og avleiðingar, sum kunnu vísa seg komandi tíðina og sum fult yvirlit ikki er yvir enn, og tí er ikki er ósannlíkt, at onnur fígging má finnast til ein part av landsskattalættanum. Meirilutin viðurkennir, at so er. Ein av hesum pørtum er tey seinastu tvey árini í avtøkuni av uttanlandsfrádráttinum og samdøgursfrádráttinum.

Tí mælir meirilutin í broytingaruppskoti í tí málinum (løgtingsmáli nr. 37/2023) til, at hildið verður fast við stigvísu minkingina í 2024, 2025 og 2026, meðan ávikavist stigvísa minkingin og endaliga avtøkan árini 2027 og 2028 verða sleptar. Hetta verður mett at hava við sær eina írestandi fígging à umleið 8 mió. kr. í 2027 og 8 mió. kr. 2028. Í hesum sambandi heldur meirilutin, at landsstýriskvinnan eigur at arbeiða við nýggjari fígging til hendan partin.

Orkuískoyti
Tað eru húski í Føroyum millum annað hjá fyritíðarpensjonistum og ávísum fólkapensjonistum, har inntøkan er so lág, at luturin í skattalættanum er lítil, samstundis sum avgjøldini hækka sum hjá øðrum. Tí verður lagt upp til, at hesi húski skulu hava møguleika fyri einum orkuískoyti á 5.000 kr. um árið komandi trý árini, fyri at skattaumskipanin ikki verður ein bági hjá hesum húskjum, sum longu í dag í nógvum førum hava ein gerandisdag, sum er sera torførur at fáa at hanga saman.

Tó fer støðan hjá fólkapensjonistum eisini at batna m.a. við javningini av almannaveitingum, sum hevur við sær, at støk fara at hava umleið 6.000 kr. meira um árið at liva fyri og hjún umleið 5.100 kr. hvør meira um árið at liva fyri.

Meirilutin viðurkennir samstundis, at tað eru húski í Føroyum, har tað hevði verið ynskiligt at gjørt átøk, sum gjørdu gerandisdagin lættari. Undir hoyringunum er upplýst, at hesi húski serliga eru í ávísum pørtum av landinum. Men tað er greitt, at tað er sera torført at gera batar hjá hesum húskjum gjøgnum tillagingar í landsskattinum.

Meirilutin staðfestir, at ein møguleiki kundi verið í skattalógini at latið upp fyri, at kommunurnar fáa møguleika at hækka botnfráttin í kommunuskattinum.

Tríggjar umskipanir síðstu 15 árini
Samlað er at siga, at hendan skattaumskipanin à 200 mió. kr. er ein tann størsta skattaumskipanin í Føroyum í nýggjari tíð. Tað er greitt, at serliga miðalinntøkur, men eisini arbeiðarar, fáa størsta fyrimunin av hesari umskipanini.

Tó at hetta er ein stór umskipan, hava tvær aðrar verið seinastu 15 árini. Í 2012 varð ein skattaumskipan framd, sum gav hægstu lønarinntøkunum nógv tann størsta skattalættan. Var lønarinntøkan kr. 50.000 um mánaðin merkti tað ein lætta í landsskattinum uppá gott 3.800 kr. um mánaðin, og var lønarinntøkan kr. 100.000 um mánaðin merkti tað ein lætta í landsskattinum uppá knapt 6.800 kr. um mánaðin. Hetta varð fíggjað við at framskunda skattainntøkur landskassans av pensjónum, nakað sum líka síðan hevur minkað um haldførið hjá landskassanum.

Í 2016 varð seinasta munandi skattaumskipanin framd. Ta ferðina varð skattalætti latin inntøkum á til dømis 12.000 krónur um mánaðin á 300 krónur um mánaðin, inntøkur millum 20.000 og 27.000 krónur um mánaðin fingu 700 krónur í mánaðarligum skattalætta, meðan inntøkur yvir 42.000 krónur ongan skattalætta fingu.

Í hesum umfarinum eru tað teir bólkarnir av miðalinntøkum, sum fingu tann lutfalsliga minsta skattalættan í 2012 og 2016, ið nú fáa tann lutfalsliga størsta skattalættan, samstundis sum at hendan umskipanin í stóran mun er ein tiltrongd javning av skattastiganum.

Við hesum viðmerkingum tekur meirilutin undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Minnilutin (Beinir Johannesen, Magnus Rasmussen og Steffan Klein Poulsen) hevur hesar viðmerkingar:

Í sær sjálvum er hetta uppskotið ein skattalætti fyri føroyska borgaran. Hetta uppskotið skal tó síggjast í ljósinum av einum samlaðum pakka av lógaruppskotum, sum blivu løgd fram saman við skattalættanum. Í sínari heild er tí ikki talan um ein skattalætta, men heldur eina skattaumskipan.

Tá ein skattalætti er fíggjaður, merkir tað í stuttum, at samgongan gevur við aðrari hondini og tekur við hinari.

Tað eru tey "miðalløntu" sum fáa størsta lættan. Miðallønt er tó eitt ógreitt hugtak, tí hvør er miðalløntur. Samgongan hevur víst á, at eitt miðallønt húski tjenar á leið 800.000 kr. um árið. Minnilutin vil tó vísa á, at hugtakið miðalløn skal nýtast við stórum fyrivarni. Um til dømis ein, ið forvinnur nógvar milliardir lønarkrónur um árið, flutti til Føroya, so vildi miðalløn í Føroyum knappliga verið fleiri miliónir. Hetta er eitt banalt dømi, sum tó lýsir, hvussu misvísandi hugtakið miðalløn kann verða fyri vanliga føroyingin.

Miðinntøkan (median) hinvegin sigur nakað um føroyingin, sum liggur mitt í løntakarfjøldini, og er tí eitt meira rættvísandi hugtak at nýta. Miðinntøkan var kr. 288.317 í 2021 og svarar einans til ein góðan triðing (36%) av 800.000 kr. sum eitt miðalhúski sambært samgonguni tjenar.

Tey, sum gjalda fyri skattalættan, eru í høvuðsheitum vinnan í sambandi við brennioljugjald og F-gass, føroyingar sum arbeiða uttanlands, ið verða skerdir í uttanlandsfrádrátti v.m., og á sjónum, sum verða skerdir í fiskimannafrádrátti. Harumframt blíva allir føroyingar undirlagdir at rinda sokallað grøn avgjøld, sum raka tey lágløntu meinast.

Spurnartekin kunnu eisini setast við, um henda skattaumskipan er fíggjað yvir tíð. Størsti parturin er fíggjaður við sonevndum grønum avgjøldum. Um grøna orkuskiftið gongur eftir ætlan, fara hesi avgjøldini at minka munandi komandi árini.

Allir teir føroyingar, sum arbeiða í einari serskattaskipan, sum samgongan nú ætlar at broyta, fara so líðandi at gjalda meira í skatti fram til 2026. Teirra skattabyrða økist samanlagt við 42 mió. kr. yvir trý ár, vísandi til broytingaruppskotið hjá meirilutanum í løgtingsmáli nr. 37/2023. Eitt er tað, at skatturin fyri hesar borgarar hækkar. Tað er tó óvist, um teir yvirhøvur verða verandi í Føroyum, ella um teir velja at skifta arbeiði og harvið enda í aðrari serskattaskipan eitt nú DIS. Harafturat verða føroyska vinnulívið og føroyski borgarin áløgd at rinda 121 mió. kr. í hækkaðum grønum avgjøldum og harvið eisini hækkaðum elprísum. Grønu avgjøldini traðka fult í kraft longu eftir tveimum árum.

Summar fyritøkur fara tí at rinda nógvar milliónir í hægri orkuprísum. Hetta fer at gera, at kappingarførið hjá føroyskum fyritøkum versnar munandi mótvegis fyritøkum uttanlands. Dømi er um fyritøku, ið fer at rinda einar 20 mió. kr. eyka í hægri orkuprísum.

Fyri einstaka borgaran er tað øgiliga misjavnt, hvussu skattaumskipanin rakar. Tey sokallaðu miðalløntu fáa størsta lættan. Tey lágløntu fara hinvegin ikki at merkja stórvegis lætta, tá ið omanfyri nevndu avgjøldini eru drigin frá skattalættanum.

Hinvegin so løgdu flokkarnir, sum minnilutin umboðar, uppskot fram um skattalætta og hægri barnafrádrátt farna vetur, uttan at leggja eyka avgjaldsbyrðar á borgaran. Hesi uppskot fullu tó burtur í sambandi við løgtingsvalið. Minnilutin metir framvegis, at tað er alneyðugt at fara inn í skattastigan og tillaga mørkini soleiðis, at lág- og miðalløns fáa ein skattalætta. Mørkini eru ikki broytt síðani 2016 og elva harvið til alsamt hægri inntøkuskatt orsakað av lønarvøkstrinum. Hóast tað ikki er ein partur av hesum uppskotinum, er minnilutin positivur fyri ætlanunum um at javna skattastigan frameftir.

Ein skattalætti er hart tiltrongdur í sjálvum sær, men hetta uppskotið er sum sagt ein skattaumskipan, har givið verður við aðrari hondini og tikið við hinari. Hetta máar tí grundarlagið undan skattalættanum, serliga hjá lægri løntum.

Minnilutin tekur støðu í tingsalinum.

Fíggjarnevndin, 11. desember 2023

Eyðgunn Samuelsen forkvinna	Beinir Johannesen næstformaður	Bjarni Hammer
Eirikur í Jákupsstovu	Hanna Jensen	Magnus Rasmussen
	Steffan Klein Poulsen	